# Løgtingið hevur slætt borð

**Løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, sigur, at løgtingið hevur so at siga slætt borð, nú farið verður í jólafrí. Tað er fyrstu ferð í fleiri ár, at løgtingið ikki hevur fleiri málá dagskrá, sum ikki eru avgreidd undan jólum**

LØGTINGSJÓL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




*– Tað hevur gingið ómetaliga væl í ár. Vit hava nærum slætt borð, og tað er fyrstu ferð í fleiri ár.*

*Mynd: Savnsmynd*

– Tað hevur gingið ómetaliga væl í ár. Vit hava nærum slætt borð, og tað er fyrstu ferð í fleiri ár.

Løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, fegnast um, at tingmál ikki eru blivin til jólatrøll í ár. Hann vísur á, at tað eru bert tvey mál, sum eru undir viðgerð í løtuni.

– Uppskotið um at avtaka skrásetingargjaldið av motorsúkklum og eftirgeving av skuld eru einastu mál, sum liggja eftir. Avtøkan av skrásetingargjaldinum hevur havt 1.viðgerð og er enda í nevnd, meðan fíggjarnevndin hevur biðið um at útskjóta málið um eftirgeving av skuld, greiðir løgtingsformaðurin frá.

Spurdur hví tað hevur gingið so væl at fáa mál avgreidd í jólamánaðinum, svarar Edmund Joensen:

– Tað kemur fyrst og fremst av at færri mál hava verið løgd fyri tingið. Bæði samgongan og andstøðan hava ikki havt eins nógv mál á skránni sum undanfarin ár. Eg haldi eisini, at nýggja planleggingin í løgtinginum eisini ger sítt til, at tað hevur gingið betur at fáa málini avgreidd í ár, vísir løgtingsformaðurin í ár.

Løgtingið kemur saman aftur mikudagin 19. januar. Tá verða munnligir- og skrivligir fyrispurningar á skránni.

# Vit drekka tað sama á jólum

**Jólasølan hjá Rúsdrekkasølu Landsins er tann sama sum undanfarin ár. Higartil í ár hevur Rúsdrekkasøla Landsins selt fyri 8,5 mió kr.**

Hóast greið tekin eru í føroyska samfelagnum, at búskaparligi framburðurin seinastu árini er steðgaður, drekka føroyingar framvegis tað sama á jólum. Á Rúsdrekkasølu Landsins siga tey, at sølan av øli, víni og brennivíni um jólini er tann sama sum undanfarin ár. Hinvegin hava føroyingar lagt á annan bógv, hvat sterkum løgi viðvíkur.

– Tað hava verið greið tekin um, at føroyingar eru farnir frá at drekka líka nógv brennivín sum undanfarin ár. Tað er í nógv størri mun øl heldur enn brennivín vit drekka, sigur Jens Mikkelsen, roknskaparleiðari á Rúsdrekkasølu Landsins.

Roknskaparleiðarin leggur afturat, at føroyskt øl er framvegis nógv best umtøkt, og stendur fyri 2/3 av samlaðu ølsøluni.

### Eitt vet lægri

Jens Mikkelsen sigur, at helst verður samlaða sølan hjá Rúsdrekkasølu Landsins fyri 2004 eitt vet lægri enn undanfarin ár. Í fjør seldi Rúsan fyri 14,5 mió. krónur í alt, og higartil hevur Rúsdrekkasøla Landsins selt fyri í alt 8,5 mió. krónur.

Seinastu dagarnir í desember roynast vanliga væl, og hóast samlaða sølan helst ikki røkkur somu hæddum sum í fjør væntar roknskaparleiðarin, at nógv fara at leita sær í Rúsuna millum jól og nýggjár.

**.páll**

# SS selur mest

**Bókin hjá Grækarisi D. Magnussen um dreingirnar í Waffen SS liggur ovast á bókalistanum hjá Bókasøluni í SMS**

BÓKASØLA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Jólini eru uttan iva tann stóra bókahátíðin í Føroyum. Aftur í ár eru hópin av bókum komin til jóla, og hóast tað trýtur við almennum hagtølum; hvussu væl tær ymisku bókurnar selja, hevur bókasølan í SMS gjørt eina uppgerð yvir, hvørjar bókur eru best umtóktar millum keypararnar í SMS.

Á heimasíðuni hjá Bókasøluni, bókasølan.fo, ber til at fylgja við, hvørjar bøkur væntandi vera undir jólatrøðunum í ár.

**Topp 10-føroyskar**
1) Dreingirnir í Waffen SS
2) Okkara Millum
3) Við úthavsins strendur
4) Kaj
5) Havnar Søga 1
6) Terradropar
7) Komin er nú onnur øld
8) Havnar Søga 2
9) Koyr á HB
10) Sebastians hús

**Topp 10 - danskar**
1) Jamie Oliver 1+2+3
2) Guinness world records 2005
3) Da Vinci mysteriet
4) Mærsk
5) Når engle spiller Mozart
6) Fodbold 2004
7) Smoothies og juicer
8) Det skal mærkes at vi lever
9) Ryd op i dit rod
10) Den klassiske køkkenskole

**Topp 10 - barnabøkur**
1) Mín Jólabók 2004
2) Góða nátt
3) Góðan morgun
4) Signingar hvønn dag
5) Fólk og dólgar í Kardamummubýnum
6) Petur Kanin - Fingradukkubók
7) Dumbo
8) Stóra klaffabókin hjá Flekk
9) Stóra bókin um ribbaldin Bibba
10) Appilsingentan




*Eins og undanfarin ár liggur ein bók hjá Grækarisi D. Magnussen ovast á bókalistanum til jóla. Í Bókasøluni í SMS eru "Dreingirnar frá Waffen SS" best umtókta bókin í løtuni*

## Yvirskot á samhandlinum

Fyrstu níggju mánaðirnar var yvirskotið á samanlagda vøruhandlinum við útlond 7 miljónir. Tó skal gerast vart við, at allur útflutningurin er ikki skrásettur enn, skrivar hagstova føroya á heimasíðu sínari.

Samanlagt er mánaðirnar januar til september innflutt fyri 3% meira í virði av vørum til byggivinnuna í 2004 enn í 2003. Í vekt er kortini talan um eina minking upp á 8%.

Av sementi er innflutt 8% minni í vekt í ár.

Av ráum ella óviðgjørdum timbri er innflutt 9% minni í ár, men av byggiplátum av ymsum slagi og seymi er sama nøgd innflutt. Hesir vørubólkar eru í stóran mun brúktir í vanligari sethúsabygging og tekin skuldu ti verið um, at sama virksemi ella kanska ein lítil minking hevur verið ella er væntandi í sethúsabyggingini.

Útflutningsvirðið á toski, hýsu og upsa minkað við 115 miljónum, og á laksi og sílum við 112 miljónum

Fyrstu níggju mánaðirnar í ár var útflutningurin samanlagt 46 túsund tons ella 13 % minni enn somu mánaðir í fjør. Í virði er talan um eina minking upp á 106 miljónir ella 4 %. Samanlagt er útflutt fyri 2.756 miljónir.

Av toski, hýsu og upsa er útflutt fyri slakar 115 miljónir ella 10 % minni. Í nøgd er talan um eina minking upp á 12 %. Av hesum fiskasløgum er tað serliga upsin, sum ger munin. Útflutningurin av upsa er farin niður við 20 % í nøgd og 23 % í virði.

Útflutningurin av laksi er minkaður góðar 44 miljónir ella 8%, og av sílum er minkingin út við 68 miljónir ella 52%.

Gerast skal vart við, at av tí at avreiðingar uttanlands hava lyndi til at vera seint skrásettar, er bæði møguligt og trúligt, at útflutningurin verður størri tá av tornar. Serliga eru tað útfluttur uppisjóvarfiskur, flaka- og rækjulandingar uttanlands og aðrar avreiðingar uttanlands, sum verða seinast skrásettar.

**tn**